DAGBÓK

Leygardagur 14. oktober

15. oktbr.: 21. sunnudagur eftir trinitatis.

18. oktbr.: Sól risur kl. 7.20 og set ur kl. 17.40. Full sól.

19. oktbr.: Mánin longst frá jørðini.

Í dag: veturnætur og vetrarhálvárið er byrjað. Í morgin byrjar onnur vetrarvikan.

ENDURMINNINGAR UTTANLANDA

15. oktbr.: 50 ár farin síðan Mata Hari varð tikin av døgum. Hon varð fødd í 1876 og virkaði sum njósnari undir fyrra ver aldarbardaga. Rætta navn hennara var Margrietje Geertruide Zelle, fødd í Leeuwarden í Hollandi, gifti seg við hollendskum offiseri og flutti til Indonesiu. Kom heim aftur og var indonesisk dansikvinna. Var framúr vøkur. Ákærd undir fyrra veraldarbardaga í Paris fyri at vera týskur njósnari. Varð dømd til deyða og skotin. Lagna hennara varð evni í stórum Greta Garbo-filmi í 1931.

WEEK-END

M O L A R

STATSKVETT?

Knútur var í Hellas
— honum dámar ikki reytt —
bara hann nú ikki fer
ímóti Dammi gera kvett!

Bók Hitlers gongur sum heitt breyð



Bayerskir myndugleikar harmast um, at bók Adolf Hitlers »Mein Kampf« framvegis verð ur endurprentað, hóast hesir somu myndugleikar eru einaarvingar til ognirnar hjá nasistaflokkinum.

Hesir myndugleikar siga:

»Tað er likt til, at mong tráða eftir hugsunnar-hátti Hitlers. Vit arbeiða júst nú við at forða einari spanskari útgávu. Í Portugal er bókin komin í 9 upplogum, uttan at vit hava kunnu forðað hesum. Og í Danmark er bókin eisini útkomin.«

15.000 Í DANMARK

Trongdin er stór: Paludans for lag í Danmark hevur nú fyri 3. ferð endurprentað bókina sum lið í ódýrum bókum, og við hesum nýggja upplagi er bókin prentað í 15.000 eintøkum á donskum.

14 MILJÓNIR TIL HITLER

Bayerska landsstjórnin fekk einkar-útgávurættin til bókina frá amerikumonnum aftaná heimsbardagan. Tá heimsbardagin endaði átti Hitler 14 milj. kr. til góðar sum skaldaløn.

Hetta fór í landskassan, men síðan hevur stjórnin tikið stoðu: »Vit vilja ongan vinning hava av bókini.«

400.000 EINTØK Í USA

Síðan heimsbardagan er bókin komin á enskum (amerikanska upplagið var 400.000 eintøk), arabiskum, grikskum, japanskum, spønskum, fronskum, portugisiskum og donskum.

Einkarrættur Bayerns umfatar eisini aðrar bøkur: »Onnur bók Hitlers — skjal frá árinum 1928«, sum myndugleikarnir hava givið loyvi at prenta.

Einkarrætturin geldur eisini bókina hjá Alfred Rosenberg »Sogan í 20. old«, men hana hevur eingin hug at endurprenta.

Kvinnan

MEGINPARTURIN AV HEIMINUM VÍSIR KNØ

Tað verður altíð torført at seta upp eina sannlýsing av, hvi mótarnir — serstakliga kvinnumótarnir — eru so skiftandi. Burtursæð frá einum — peningaligum og sálarliga lætt forkláruligum áhuga fyri at fáa nakað nýtt og annarleiðis, verður valla komið til botns í hesum máli.



Heilt ópolitiskir eru mótarnir ikki, um kannað verður, hvussu vorðið er eystanfyri og vestanfyri jarntjaldið.

* Í dag eru London og Moskva
* fullsamd um, at kjólarnir skulu enda 15 cm omanfyri knæið
* Men hetta er ikki heimsrekord.
* New Zealand sigur 17 cm,
* meðan Firenze sigur 10 cm og
* New York 5 cm.

Í Hamburg og Hongkong halda teir seg til knælongd, og í Montreal røkka kjólarnir einar 2 cm niður um knæið.

Góð ráð

BRILLURNAR



Fyri at sleppa frá døggini á brillunum, skal ein bara gniggja gløsini við turrari sápu og turka væl aftaná.

hugskot

EDB SANG FYRI BESK

Besk, sum var ein av teimum fyrstu elektronheilinum í heiminum, varð tikin í brúk í 1953. Nú er hann farin á museum. Hann fekk ein vakran deyða, tá ein yngri starvsbróður, ein Facit-EDB compator sang »Helan går« til avskeð. Hin syngjandi starvsbróðurin gev ur nú eisini uppat, men sleppur ikki á museum, tí songlutir í honum skulu brúkast til nýggj tól.



* Besk fer í søguna sum roknimaskinan, sum við svenska riksdagsvalið í 1960 segði frá, at kommunistaflokkurin fór at vinna stóran meiraluta, og at Svøríki fór at fáa kommunista nistastjórn. Her fór Besk skeiv ur. Kommunistarnir fingu bara 4,6 pst. av atkvøðunum. — Tá Besk var ungur, vóru bara 400 elektronheilar í heiminum; í dag eru meira enn 50.000.

SJÓVINNA

Risaskip: 240.000 tons

Skipini gerast alt størri og størri. Nú gera menn skipasmiðjur, ið byggja kunnu skip uppi 500.000 tons á stødd.

Størsta tangaskipabygging, ið nakrantíð er farin fram í Europa, skal nú gerast á danska Lindøskipasmiðjuni í Odense. Tað er Esso, ið hevur gjørt sáttmála um bygging av tveim tangabátum, sum hvør er 240.000 tons. Hetta eru bara 2 av 10 tangaskipum av sama slag, sum Esso nú letur byggja. Skipini skula latast eigaranum einaferð í 1970unum. Men vænta, at annað av hesum skipunum ikki bara verður bygt í Danmark, men at tað eisini kemur at sigla undir donskum flaggi.



Hesir miklu skrokkar verða 335 metrar langir, 52 m breiðir og djúpdin 19,5 m.

VÍSIND

NÚ BER TIL AT KANNA, UM TAÐ LOYSIR SEG AT BJARGA EINARI MENNISKJU ELLA IKKI

Eftirlit við blóðlikamum

Ein nýggj, vísindalig uppfinning er ein analysator til livandi kykur — eitt tól, ið vísindamenn hava lagt miklan dent at funnið fram til.

Í rúmdarøldini er neyðugt at hava amboð, ið kunnu gera kanningararbeiði á stoðum, ið mennniskjuni enn ikki eru før fyri at koma til Soleiðis skulu teir við hesum tóli kanna, um tað er lív á Mars ella ikki. Tólið kann sjálvandi eisini brúkast á jørðini, og tá fyrst og fremst at siga frá tilstandinum hjá teimum menniskjansligu blóðlikamunum.



* Serliga hent er hetta í atomøldini, um atomvanlukkur
* skuldu hent. Tólið kann tá
* kanna blóðlikamini og siga
* læknunum, hvørji fólk, tað
* loysir seg at royna at bjarga,
* ella hvørji ongar livsmøguleikar hava.

BRÆV frá Kassin


SOSIALURIN

Nú er so mikið fráliðið, at ein hevur gloymt ymisk úrslit frá seinasta vali. Tá tað hevur athúga, loyvi eg mær at spyrja blaðið, hvørji endaligu valúrslitini vóru hjá sjálvstýrisflokkunum.

J. M. J.

SVAR: Samanborið við løgtingsvalið 1962 gingu sjálvstýrisflokkarnir 2,8 pst. aftur. Sjálvstýrisflokkurin ÷ 1,0 pst. ,tjóðveldisflokkurin ÷ 1,6 pst. og framburðsflokkurin ÷ 1,6 pst., men fólkaflokkurin gekk fram við 1,6 pst.

FIMMARIN



1 = friður og skørp
2 = útlendska
3 = fuglur
4 = amboðið
5 = goyma

VÆL SAGT

Láturin fær bilbukt við alt — hann er tað sterkasta av øllum vápnum. Tað er ein stór gleði at kunna hevna seg lænandi! (Voltaire)


Mitt í samkensluni merkja vit ein neista av beisksøtari og óndsinnaðari gleði við at siggja onnur pínast! (Montaigne)

Hin vanliga reglan: eingin kollvelting uttan harðræði! (Napoleon)

5 spurningar

1) Hvør er heimsins størsta fiskitjóð?
2) Hvat merkir orðið pentagon?
3) Hvat er Pentagon?
4) Hvat er meðalregn í Hvalvík um árið
5) Hvat er meðalregn í Mikinesi um árið?

SVAR: 1) Japan 2) regluligur flmm kantur 3) veðurmálaráðið í Washington 4) 3000 mm 5) 800 mm.



Yvir: 1) fuglur 6) mannsnavn 7) livir 9) seks 10) streymur 12 persónsfornavn 14) 80 16) tóni 17) í andlitinum 19) mannanavn.

Niður: 1) Máttmikil 2) hol 3) djór 4) skriviamboð 5) manglar 8) segl 11) dott 13) undir fóti 15) vinningur 18) skipastavir.



— Tú ert býttur, segði konan. Og hon hevði rætt. Annars hevði hann ikki gift seg við henni!

* * *

Professarin: Lat meg hoyra, hvussu tit greiða frá arvalæruni.

Studenturin: Arvalæra vil siga, at um pápi og mamma ikki kunnu fáa børn, so kann eg heldur eingi børn fáa.

* * *

Ein heldur tað altíð vera eina hugnaliga samrøðu, tá ið hin parturin tegir!

* * *

Politimaðurin kom fram á tveir menn, ið bardust drápuliga. Ein smádrongur hugdi at teimum.

Politimaðurin: Hvør av hasum er pápi tín?

Drongurin: Eg veit ikki, tað er tað, teir berjast um.

* * *

Tað finnast framveg's fólk, ið hava virðing fyri meiningum hjá øðrum — serstakliga tá tey hava somu meining.